Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Nr. 17/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um arbeiðsumhvørvi, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvat fer landsstýrismaðurin at gera fyri at tryggja arbeiðsumhvørvið á føroyskum arbeiðsplássum?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at Arbeiðseftirlitið hevur nógv høga játtan og nóg nógv starvsfólk til at vera úti á arbeiðsplássum og kanna arbeiðstrygdina? Um ikki, hvat ætlar landsstýrismaðurin so at gera við hetta?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at hækka sektina fyri at bróta arbeiðsumhvørvislógina?

Viðmerkingar:

Komið er fram í miðlunum, at rættiliga nógvar arbeiðsvanlukkur og arbeiðsóhapp eru í Føroyum samanborið við onnur lond. Bæði fyri arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar er umráðandi, at arbeiðstrygdin er í lagi. Fyri at fáa greiðu á, hvørjar ætlanir eru fyri at bøta um arbeiðstrygdina á føroyskum arbeiðsplássum, verður hesin spurningur settur.

Á Løgtingi, 10. september 2020

Beinta Løwe Jacobsen